*– Síðsta árið hevur víst, at leikararnir ikki eru nóg stinnir í avgerðandi dystunum, og tí meta vit, at liðið kann gerast nógv sterkari, enn tað er í løtuni*

*Dia Midjord, venjari hjá VÍF*

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# ÍTRÓTTUR

# Forkunnug útlendsk hondbóltsvitjan til Kollafjarðar

Hóast ítróttahøllin í Kollafirði enn ikki alment er tikin í nýtslu, so hava vaksnamannadeildirnar í eina tíð vant í høllini, og komandi vikuskifti verður lagt til brots við eini spennandi kapping millum trý føroysk 1. deildarlið í hondbólti og danska liðið Aab, sum kemur á vitjan við sínum næstbesta liði.

Um vikuskiftið komandi kemur lið úr hondbóltsfelagnum Aab á vitjan í Kollafirði. Talan er í høvuðsheitinum um ungar leikarar hjá felagnum. Liðið er 2. lið hjá Aab, og tískil tað liðið hjá felagnum, ið er menningarlið hjá ligaliðnum. Ligaliðið hjá Aab hevur annars havt eina góða byrjan upp á kappingarárið. Teir hava spælt tveir dystir og vunnið báðar, ávikavist ímót Ajax úti og TMS Ringsted heima.



*- Leikararnir eru góðir og evnaríkir, og málið er fyrst og fremst at menna hesar leikarar til at koma inn á ligaliðið og at finna útav, hvørjir kunnu fáa sáttmála við besta lið hjá felagnum. Hetta sigur venjarin Finn Christensen*

Flestu leikararnir á føroyaferðini eru føddur í 1987 og hava spælt saman øll ungdómsárini. Liðið hevur altíð verið millum fremstu liðini í Danmark, hevur vunnið eitt danmarskmeistaraheiti og var í fjør nr. 2 í unglingadeildini. Fleiri av leikarunum, ið um vikuskiftið fara at kappast ímóti føroyskum liðum, eru leikarar, ið hava evni til at verða sáttmálabundnir at ligaliðnum hjá Aab.

Aab kemur til Føroya fríggjadagin, og skal spæla dyst ímóti 1. deildarliðnum hjá KÍF fríggjakvøldið kl. 20.00 í nýggju ítróttahøllini í Kollafirði. Leygardagin verður so kapping ímillum VÍF, Kyndil, KÍF og Aab, har øll liðini spæla ímóti øllum. Kappingin byrjar kl. 13.00 og endar kl. 19.00

Kári Mortensen, venjari hjá KÍF, hevur fingið danska liðið hendavegin. Hann hevur havt samband við Rene Kristensen, fyrrverandi venjara í Neistanum, sum nú venur ungdómslið hjá Aab, og saman við honum fingið ferðina í lag. Rene Kristensen verður við á ferðini, og er hann tann einasti í hópinum, sum hevur verið í Føroyum áður.

Danska liðið fer av stað aftur mánadagin.

Umframt at spæla hondbólt er ætlanin at leikararnir eisini skulu síggja annað enn hondbólt, meðan teir eru í Føroyum, og tí verður farið ein túr niðan á Skæling sunnudagin, um veðrið verður til vildar.

## Ligaliðsleikari kemur leygardagin

Ein av leikarunum hjá Aab, Mikkel Ibsen, verður ikki við hópinum, sum kemur til Føroya fríggjadagin. Hann hevur nevniliga júst skrivað sáttmála við ligaliðið hjá Aab og skal spæla dyst fríggjakvøldið. Hann vil tó ógvuliga fegin til Føroya og kemur tí í staðin leygardagin, og hann verður við til dystirnar í sjálvari kappingini.

## Royndir leikarar á liðnum

Flestu leikararnir á Aab-liðnum, sum kemur til Føroya um vikuskiftið, eru ungir leikarar. Tó er onkur eldri leikari eisini við. Nevnast kunnu 32 ára gamli Ole Kuhr, sum í fjør var fastur málmaður á ligaliðnum og 2,04m høgi vinstrahándsbakkurin, Peter Nørregaard, sum júst er komin til Aab úr KVIK Humlebæk av Sælandi.

## Hondbóltur á høgum støði

Finn Christensen, venjari hjá liðnum, sum kemur til Føroya, sigur, at liðið er eitt sera spennandi og evnaríkt lið."Leikararnir eru góðir og evnaríkir, og málið er fyrst og fremst at menna hesar leikarar til at koma inn á ligaliðið og at finna útav, hvørjir kunnu fáa sáttmála við besta lið hjá felagnum.

## Kappingin leygardagin 23. sept.

Kappingin í ítróttahøllini í Kollafirði leygardagin 23. september er skipað sum ein kapping ímillum trý føroysk 1. deildarlið, VÍF, Kyndil og KÍF og danska liðið Aab.

**Dystarskráin er henda:**

| | |
|---|---|
| Kl. 13.00 | KÍF – VÍF |
| Kl. 14.00 | Aab – Kyndil |
| Kl. 15.00 | VÍF – Kyndil |
| Kl. 16.00 | KÍF – Aab |
| Kl. 17.00 | Aab – VÍF |
| Kl.18.00 | Kyndil - KÍF |

# Todi spælir hálvfinalu í kvøld

Todi Jónsson verður eftir øllum at døma millum teir fyrstu 11, tá Start í kvøld skal spæla hálvfinallu í norsku steypakappingini. Hendan verður á útivølli móti Fredrikstad, ið annars er felagið, sum helt seg hava fingið Toda í hópin fyri góðum ári síðani. Fyri knøppum mánaði síðani spældi Start á útivølli móti Fredrikstad, sum tá vann tryggan 4-0 sigur í landskappingini.

Tann dystin sat Todi uttan fyri við lítlum skaða, men hann verður mest sum heilt víst við frá fyrsta bríksli hesaferð. David Nielsen, sum Todi vanliga kappast við um plássið frammi í álopinum, er nevnliga leikbannaður.

Í Start verður sagt, at talan nú er um týdningarmesta dystin á árinum. Hóast felagið enn kann røkka europiskum fótbólti umvegis landskappingina, so er steypakappingin skjótari vegurin í so máta, og tí verður nógv lagt fyri í royndunum at vinna hesa, verður sagt.

**-mørk**

---

# Nygaard skoraði men tapti

Queens Park Rangers, har hálvi tvøramaðurin, Marc Nygaard, er yrkisspælari, tapti í gjárkvøldi 3-2 fyri Port Vale í lítlu ensku steypakappingini – the Carling Cup.

QPR spældi á útivølli móti Port Vale, og Nygaard gav gestunum eina góða byrjan við máli til 1-0 eftir bara 9 minuttum. Tað eydnaðist tó Port Vale at koma upp á 3-1, áðrenn gestirnir aftur minkaðu um munin. Men við 3-2 tapi er QPR altso liðugt í steypakappingini á hesum sinni.

**-mørk**

# Bárður undir skurð



Í dystinum móti Skála sunnudagin, var Bárður Olsen hjálptur av vøllinum, tí knæið hjá honum vildi ikki sum hann vildi. Tað bar illa til at staðfesta beinanvegin, hvat trupulleikin hjá Bárði var, men eftir at hava verið til kanningar á Landssjúkrahúsinum týsdagin er greitt, at hann skal undir eina minni skurðviðgerð fríggjadagin.

Hetta merkir, at hann ikki verður tøkur til landskappingardystin móti B68 sunnudagin, og ei heldur til seinnu hálvfinaluna komandi mikudag.

Talan er um so mikið lítlan skurð, at Bárður sum onki kann ganga eftir skurðviðgerðina, og helst kann byrja at venja tíðliga í næstu viku.

**-mørk**

# Úttøkukappingin verður 25. november



Róðrarsambandið hevur nú gjørt av, hær úttøkukappingin til NM-kappingina í innandurarógving verður. Hendan verður í Havn tann 25. november, og sleppa bestu føroysku rógvararnir soleiðis við til NM-kappingina. Hendan verður í Gladsaxe í Danmark í døgunum 27. og 28. januar komandi.

**-mørk**